**SERSTØK BYGGISAMTYKT MILLUM HORNA**
SB_Tórshavn_Millum Horna_2021_1_2021

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, matr. nr. 1121a, 1121g, 1121h, 1121i, 1121k og 1121l, Tórshavn, og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini, er at skipa bústaðarbygging á økinum, samsvarandi kortskjali 2.

Stk. 2. Økið liggur í A1 og A2 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Sambært kap. IV, §5, stk. 9 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett fyri A1 øki, at í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerað í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til íbúðir og felags hentleikar hjá íbúgvunum.

Stk. 2. Útstykkingin hevur íbúðarbygningar, felagshøli, fríøki, goymslurúm, parkeringsøki og parkeringskjallara, sum skulu gerast samsvarandi kortskjali 2 og 3.

## §4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Byggjast skulu í mesta lagi 76 íbúðir.

Stk. 2. Parkeringskjallarin og goymslurúm verða ikki tald við í nýtslustignum, men eru partur av teimum 20 m$^2$ fyri hvønn bústað, sum ikki verða íroknaðir hæddarvíddina smb. skjali 1A.1.3, stk. 4, pkt. 1 í Bygningskunngerðini 2017.

Stk. 3. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkeringspláss skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og kortskjali 3.

## §6. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| UMHVØRVIS - OG VINNUMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 21/20294 |
| Ætlanarskriv: | 9/12-2021 |
| Góðkent: | 15/12-2021 |
| Váttað: | H Poulsen |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt Millum Horna | | | | |
| **Undirheiti** | 1 | | | | |
| **Mát** | 1:2.000 | | | | |
| **Dagur** | 09.12.2021 | **Journal** | 21/01736 | **Tekna** | RVH |




| | |
|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>**Býarskipanardeildin** | |
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt Millum Horna |
| **Undirheiti** | 2 - Støðumynd |
| **Mát** | 1:7000 |
| **Dagur** | 09.12.2021 · **Journal** 21/01736 · **Tekna** |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt Millum Horna | | | | |
| **Undirheiti** | 3 - Parkering | | | | |
| **Mát** | 1:7000 | | | | |
| **Dagur** | 09.12.2021 | **Journal** | 21/01736 | **Tekna** | |